GRANSKINGARDEPILIN FYRI SAMFELAGSMENNING



# Hvar endaðu tey øll?

## Kanning millum miðnámsskúlanæmingar í Suðuroynni 1976 - 2006

Dennis Holm

Arbeiðsrit 24/2009

ISBN 978-99918-60-17-6

# Hvar endaðu tey øll?

## Kanning millum miðnámsskúlanæmingar í Suðuroynni 1976-2006

Dennis Holm

*Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 24/2009**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú verða umbidnar kanningar, t.v.s. kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit verða altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

**Hvar endaðu tey øll? - Kanning millum miðnámsskúlanæmingar í Suðuroynni 1976-2006**

Dennis Holm 2009
Útgevari: Granskingardepilin fyri Samsfelagsmenning
Prent: Føroyaprent
Forsíðumynd: Erik Christensen
**ISBN: 978-99918-60-17-6**
**ISSN: 1601-9423**

# Innihald

FORORÐ ... 5
INNGANGUR ... 6
1. HÁTTALAG ... 7
2. VELJA FRAMHALDANDI ÚTBÚGVING ... 9
2.1. NEMA SÆR FØRLEIKAGEVANDI ÚTBÚGVING ... 9
2.2. FLEIRI MENN ENN KVINNUR FÁA SÆR LANGA ÚTBÚGVING ... 11
2.3. TIL DANMARKAR AT ÚTBÚGVA SEG ... 12
3. VENDA IKKI AFTUR EFTIR LOKNA ÚTBÚGVING ... 13
3.1. TEY BEST ÚTBÚNU BÚGVA AÐRASTAÐNI ... 14
4. STARV ... 17
4.1. ARBEIÐI OG KYNSBÝTIÐ ... 18
*Fleiri av kvinnum arbeiða hjá tí almenna ... 18*
*Handil- og tænastur ... 19*
*Fáar kvinnur arbeiða í framleiðsluvinnunum ... 19*
4.2. LEIÐARARSTØRV ... 20
5. SAMANDRÁTTUR ... 21

## Myndir

Mynd 1. Tey flestu nema sær førleikagevandi útbúgving ... 10
Mynd 2. Hvat slag av útbúgving ... 10
Mynd 3. Útbúgving og kyn ... 11
Mynd 4. Bústaður 2009 ... 13
Mynd 5. Bústaður og útbúgving ... 14
Mynd 6. Arbeiði býtt í vinnubólkar ... 17
Mynd 7. Arbeiði býtt í vinnubólkar og kyn ... 18

## Talvur

Talva 1. Bústaður 2009 ... 12
Talva 2. Bústaður í dag, býtt á árstalið, tá tey fingu miðnámsprógv ... 14
Talva 3. Bústaður og kyn ... 16
Talva 4. Vinnubólkar ... 17
Talva 5. Arbeiða innan tað almenna – býtt í bólkar og kyn ... 19
Talva 6. Leiðarastørv – býtt í kyn ... 20

## Fororð

Í 1974 byrjaði fyrsti miðnámsskúlin í Suðuroy, tá nevndur Suðuroyar HF-skeið, har ung høvdu møguleika at taka 2 ára HF (Hægri Fyrireiking) útbúgving, ætlað sum fyrireiking til framhaldandi hægri útbúgving. Fyrstu næmingarnir fingu prógv í 1976, tilsamans 22 í tal. Tey næstu 30 árini tóku 861 næmingar miðnámsprógv við Miðnámsskúlan í Suðuroy.

Um árskiftið 2008/2009 varð farið undir at kanna, hvar hesir næmingar eru farnir eftir loknan miðnámsskúla, og hvar tey búgva í dag. Hendan verkætlanin er stuðla av Suðuroyarportalinum. Takk til Ketty Petersen og Paulu Petersen, sum hava staðið fyri innsavningini av hagtølunum.

## Inngangur

Rákið í samfelagnum tey seinastu ártíggjuni hevur verið rættiliga greitt, tá umræður lívsleiðina hjá ungum. Alsamt fleiri ung velja av at nema sær miðnámsútbúgving og eftir hetta eina førleikagevandi útbúgving. Í kanning, sum Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning gjørdi í 2003 millum allar næmingar í 9. flokki og í 3. flokki á miðnámsskúlunum, søgdu 91 prosent, at tey ætla at nema sær eina førleikagevandi útbúgving.

Eins og ung í landinum sum heild hava ung í Suðuroynni eisini valt at nema sær miðnámsútbúgving fyri síðani at fáa sær eina førleikagevandi útbúgving. Fyri ung í Suðuroynni merkir hetta í flestu førum, at tey í styttri ella longri tíðarskeið mugu av oynni í útbúgvingarørindum.

Endamálið við hesi kanningini er at greina, hvar tey, sum hava tikið prógv á miðnámsskúlanum í Suðuroynni í árunum 1976 til 2006, eru endaði eftir lokna miðnámsútbúgving.

Kanningar í grannalondum okkara vísa, at ung í útjaðaranum, sum fáa sær hægri útbúgving eftir loknan miðnámsskúla, ikki venda heimaftur eftir lokna útbúgving. Eisini er endamálið við hesri kanningini at kanna, um hetta eisini er galdandi fyri føroyska útjaðaran, í hesum førum fyri ung í Suðuroynni.

Hetta er fyrsta kanning av sínum slagi í Føroyum.

# 1. Háttalag

Í tíðarskeiðinum frá oktober 2008 til mars 2009 varð spurnablaðskanning gjørd millum tey, sum hava tikið prógv á miðnámsskúlanum í Suðuroy í árunum 1976-2006. Kanningin er gjørd út frá próvlistunum hjá miðnámsskúlanum í Suðuroy í nevnda tíðarskeiði. Í hesum tíðarskeiði hevur miðnámsskúlin í Suðuroy havt HF og studentsútbúgvingar, umframt at tað í eitt tíðarskeið í 1990unum eisini vóru handilsskúlaútbúgvingar (FHS og HH) og fiskivinnuskúli á miðnámsskúlanum í Suðuroy.

**Um Miðnámsskúlan í Suðuroy**
Í 1974 byrjaði Miðnámsskúlin í Suðuroy – tá undir heitinum Suðuroyar HF-skeið – og kundu fólk tá nema sær 2 ára HF-útbúgving sum fyrireiking til hægri lestur. Undirvísingin á Suðuroyar HF-skeiði varð skipað í hølum á Tvøroyri og í Vági. Tey flestu árini við einum flokki á Tvøroyri og einum flokki í Vági, og høvdu flokkarnir so felagsundirvísing í ymiskum vallærugreinum.

Í 1994 varð Suðuroyar HF-skeið broytt til Miðnámsskúlin í Suðuroy, sum bjóðaði 3 ára studentsútbúgving. Miðnámsskúlin í Suðuroy varð tá savnaður á einum stað í hølum í Vági.

Í 2009 flutti Miðnámsskúlin í Suðuroy í nýggja Skúladeplinum í Suðuroy, sum er í Hovi, har Heilsuskúli Føroya eisini húsast.

Fleiri enn 870 nøvn eru á próvlistunum, men í nøkrum førum ganga summi nøvn aftur, m.a. hava somu næmingar í onkrum føri tikið HF-prógv og síðan tikið HH-prógv, í øðrum føri FSH-prógv og HH-prógv, umframt at summir næmingar eisini hava tikið prógv bæði á HF og á Fiskivinnuskúla.

Í tíðarskeiðinum frá oktober 2008 til mars 2009 hava vit verið í beinleiðis ella óbeinleiðis samband við fyrrverandi næmingar á miðnámsskúlanum í Suðuroy, sum hava givið upplýsingar um:.

- bústað
- útbúgving
- starv

Í samband við kanningina hava vit verið í samband við tilsamans 850 av teimum 861 næmingunum, sum hava tikið prógv á miðnámsskúla í Suðuroy. Nøkur einstøk ynsktu ikki at luttaka í kanningini. Nøkur eru ikki millum okkum meira.

Hædd eigur at vera tikin fyri, at í tíðarskeiðinum frá oktober 2008 til mars 2009 eru tað helst nøkur, sum hava flutt bústað, skift arbeiði ella útbúgving ella gjørt seg lidnan við útbúgvingina, men hetta ávirkar tó ikki úrslitini í kanningini.

# 2. Velja framhaldandi útbúgving

Í tíðarskeiðinum frá 1976 til 2006 tóku tilsamans 861 fólk miðnámsprógv á miðnámsskúlanum í Suðuroy. Tey allarflestu, sum hava tikið prógv á miðnámsskúlanum í Suðuroy, eru suðuroyingar, sum tá vóru búsitandi í Suðuroynni, tó so eru eisini nøkur, sum fluttu til Suðuroynna fyri at ganga á miðnámsskúla[1].

> Ein førleikagevandi útbúgving er ein útbúgving, sum gevur fakligan førleika til at røkja eitt ávíst starv ella ávíst starvsøkið (sum krevur útbúgvin starvsfólk).

Av teimum 861 næmingunum í 30 ára skeiðinum frá 1976 til 2006 eru 539 kvinnur og 311 menn. Øll árini – við undantøku av fýra árum (árini 1976, 1977, 1978 og 1992) – hava tað verið fleiri kvinnur enn menn, sum hava tikið prógv á miðnámsskúlanum í Suðuroy. Einstøk ár hevur býtið verið nøkulunda javnt, onnur ár heilt skeivt, men sum heild hevur býtið verið umleið 60-70 prosent kvinnur og 30-40 prosent menn.

## 2.1. Nema sær førleikagevandi útbúgving

Tey flestu, sum hava tikið miðnámsútbúgving í Suðuroynni, eru uppvaksin og vóru búsitandi í Suðuroynni, inntil tey vóru liðug við miðnámsútbúgvingina. Eftir miðnámsútbúgvingina hevur ein heilt stórur partur – 84 prosent - av næmingunum nomið sær ella eru farin undir at nema sær eina førleikagevandi útbúgving. Sí eisini mynd 1 niðanfyri.

[1] Ofta fólk, sum hava ella høvdu ættarbond í Suðuroynni.




**Mynd 1. Tey flestu nema sær førleikagevandi útbúgving**

Tá hugt verður at, hvat slag av útbúgving hesi hava nomið sær eftir miðnámsskúlaútbúgvingina, so hava 2/3 nomið sær eina miðallanga útbúgving (t.v.s. eina 3 ára útbúgving eftir miðnámsskúlan). Eins og víst í mynd 2 niðanfyri so hava heili 82 prosent av teimum, sum hava nomið sær útbúgving, nomið eina miðallanga ella langa útbúgving, meðan 18 prosent hava nomið sær eina stutta útbúgving.




**Mynd 2. Hvat slag av útbúgving**

Long útbúgving: 5 ár ella longri
Miðallong útbúgving: 3-5 ár
Stutt útbúgving: 1-3 ár

Í tíðarskeiðinum frá 1976 til 2006 eru tað sum nevnt væl fleiri kvinnur enn menn, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni – og tað eru eisini fleiri kvinnur enn menn, sum hava nomið sær framhaldandi útbúgving eftir miðnámsskúlan. Á vári 2009 vóru tað tilsamans 605 av teimum 850 fyrrverandi miðnámsskúlanæmingunum, sum høvdu nomið sær framhaldandi útbúgving eftir miðnámsskúlan. Av teimum vóru 381 kvinnur og 224 menn – 63 prosent kvinnur og 37 prosent menn. Leggjast kann afturat, at 70 kvinnur og 38 menn vóru undir útbúgving, tá kanningin varð gjørd.

## 2.2. Fleiri menn enn kvinnur fáa sær langa útbúgving

Tá hugt verður at, hvørjar útbúgvingar kvinnur og menn, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, hava tikið, so hava lutfalsliga fleiri av monnunum enn kvinnunum nomið sær langa útbúgving.




**Mynd 3. Útbúgving og kyn**

Tað eru hinvegin lutfalsliga fleiri av kvinnunum enn av monnunum, sum hava nomið sær miðallanga útbúgving. Og eru tað eisini lutfalsliga fleiri av kvinnunum enn av monnunum, sum hava nomið sær stutta útbúgving.

## 2.3. Til Danmarkar at útbúgva seg

Tað, at ung í Suðuroynni velja framhaldandi útbúgving eftir miðnámsskúlaútbúgvingina, merkir í flestu førum eisini, at tey í styttri ella longri tíðarskeið hava verið ella skulu í útbúgvingarørindum uttan fyri Suðuroynna – antin norðanfjørðs ella uttanlands.

Kanning vísir, at av teimum, sum í løtuni eru undir útbúgving – og tað eru serliga tey, sum hava nomið sær miðnámsútbúgving í árunum 2002 til 2006 – eru í løtuni 2/3 støðd uttanlands í útbúgvingarørindum eins og víst í talvu 1 niðanfyri.

| **Talva 1. Bústaður 2009** | |
|---|---|
| Suðuroy | 12% |
| Aðrastaðni í landinum | 22% |
| Uttanlands | 67% |
| **Tilsamans** | **100%** |
| *N=78* | |

Tey, sum eru undir útbúgving í Suðuroynni, eru í flestu førum í læru, eitt nú hjá fíggjarstovnum, innan tryggingarvirksemi, skrivstovu ella handverk. Tey, sum eru undir útbúgving aðrastaðni í landinum, ganga í stóran mun á Føroya Læraraskúla (lærarar og námsfrøðingar), Føroya Sjúkrarøktafrøðiskúla ella á Vinnuháskúlanum, meðan tey, sum eru undir útbúgving uttanlands, í flestu førum eru farin undir eina hægri útbúgving á universiteti.

Tey allarflestu, sum fara uttanlands í útbúgvingarørindum, fara til Danmarkar. Nøkur fá av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni í árunum 2002 til 2006, eru í øðrum londum enn í Danmark og nema sær framhaldandi útbúgving.

## 3. Venda ikki aftur eftir lokna útbúgving

Tá ung fara burtur í útbúgvingarørindum, so hevur hetta eisini stóra ávirkan á, hvørji val tey gera eftir hetta á teirra framhaldandi lívsleið. Fleiri møta maka sínum, meðan tey eru undir útbúgving. Onnur gerast bergtikin av teimum tilboðum og møguleikum, sum eru á teimum støðunum – oftani størri býir – har tey nema sær útbúgving. Og tá nógv velja at nema sær miðallangar og langar útbúgvingar, so er tað ikki altíð lætt at fáa arbeiði í Suðuroynni. – Ein samanrenning av hesum viðurskiftunum ger, at nógv ikki flyta aftur til Suðuroynna eftir lokna útbúgving.

Kanningin vísir eisini, at bert 41 prosent av teimum 850, sum í árunum 1976 til 2006 hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, búgva í Suðuroynni í dag. 30 prosent búgva uttanlands, og 29 prosent búgva aðrastaðni í Føroyum.




**Mynd 4. Bústaður 2009**

Ein munandi partur (62 prosent) av teimum, sum hava nomið sær miðnámsprógv í Suðuroy árini 2002 til 2006, eru í løtuni undir útbúgving.

**Talva 2. Bústaður í dag, býtt á árstalið, tá tey fingu miðnámsprógv**

| Bústaður / Árstal | 1976-2001 | 2002-2006 | Tilsamans | N= |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 43% | 29% | 41% | 351 |
| Aðrastaðni í landinum | 31% | 18% | 29% | 246 |
| Uttanlands | 26% | 53% | 30% | 253 |
| Tilsamans | 100% | 100% | 100% | 850 |

Í talvuni omanfyri er skilt millum tey, sum tóku miðnámsprógv í árunum 1976-2001 og tey, sum tóku miðnámsprógv í árunum 2002-2006. Sum nevnt er ein munandi partur av teimum í seinna bólkinum í løtuni undir útbúgving, serliga uttanlands. Tá bólkarnir verða samanbornir, so er greitt, at í mun til tølini fyri bólkin 1976-2001, so búgva lutfalsliga færri av teimum, sum eru í bólkinum 2002-2006, í Suðuroynni og aðrastaðni í landinum, meðan fleiri búgva uttanlands.

## 3.1. Tey best útbúnu búgva aðrastaðni

Tá hugt verður at bústaði og útbúgving hjá teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, so er mynstrið rættiliga greitt.




**Mynd 5. Bústaður og útbúgving**

Tey, sum hava nomið sær langa útbúgving, búgva serliga uttanlands ella aðrastaðni í landinum. Tey, sum hava nomið miðallanga útbúgving búgva serliga í Suðuroynni og aðrastaðni í landinum. Meðan ein lutfalsliga stórur partur av teimum, sum eftir miðnámsskúlan hava tikið stutta útbúgving, búgva í Suðuroynni, ein partur býr aðrastaðni í landinum, og nøkur búgva uttanlands. At enda býr ein stórur partur av teimum, sum onga útbúgving hava tikið eftir miðnámsskúlan framvegis í Suðuroynni.

Við øðrum orðum: ***Tey við hægstu útbúgvingunum venda ikki aftur til Suðuroynna***.

Um samanborið verður við aðrar kanningar, so vísir kanning, sum Stuðulsstovnurin gjørdi í 2007 millum tey, sum høvdu tikið prógv á hægri útbúgvingarstovni í árunum 2002-2006, at minni enn helvtin av teimum, sum hava verið uttanlands í útbúgvingarørindum, flyta aftur til Føroyar (Stuðulsstovnurin 2007). Hóast tølini í hesari kanningini ikki eru beinleiðis sambærilig við kanningina hjá Stuðulsstovninum, so eru tó nøkur viðurskifti, sum kunnu samanberast. -At kalla øll, sum hava tikið prógv á miðnámsskúlanum í Suðuroy, og sum síðani hava tikið eina langa, hægri útbúgving, hava verið uttanlands í úbúgvingarørindum. Sum víst í mynd 5 omanfyri, so eru umleið 55 prosent av hesum í dag búsitandi í Føroyum, meðan 45 prosent eru búsitandi uttanlands. Úrslitini í hesari kanningini benda sostatt á somu niðurstøðu sum kanningin hjá Stuðulsstovinum, at umleið helvtin av teimum best útbúnu venda ikki aftur til Føroyar.

## 3.2. Bústaður og kyn

Tá hugt verður at bústaði og kyni, so búgva lutfalsliga fleiri av kvinnunum enn monnunum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, í dag í Suðuroynni. Lutfalsliga fleiri av monnunum búgva aðrastaðni í landinum, meðan lutfalsliga fleiri av kvinnunum búgva uttanlands.

**Talva 3. Bústaður og kyn**

| | Kvinnur | | Menn | | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Tal** | **Prosent** | **Tal** | **Prosent** | **Tal** | **Prosent** |
| Suðuroy | 233 | 43% | 118 | 38% | 351 | 41% |
| Aðrastaðni í Føroyum | 144 | 27% | 102 | 33% | 246 | 29% |
| Uttanlands | 162 | 30% | 91 | 29% | 253 | 30% |
| **Tilsamans** | **539** | **100%** | **311** | **100%** | **850** | **100%** |
| *N=850* | | | | | | |

Um hugt verður at sjálvum tølunum, so hava væl fleiri kvinnur enn menn tikið miðnámsútbúgving í Suðuroynni – og í tølum eru tað eisini væl fleiri kvinnur enn menn, sum hava valt at búseta seg aðrastaðni enn í Suðuroynni. Hetta er eisini ein av høvuðsorsøkunum til skeiva kynsbýtið í Suðuroynni – tað eru fleiri menn enn kvinnur í Suðuroynni.

## 4. Starv

Í kanningini varð eisini spurt, hvar tey, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni í árunum 1976 til 2006, arbeiða í dag. Svarini eru bólkaði í mun til bólking í vinnubólkar, sum Hagstova Føroya brúkar. Út frá hesari bólking kann skiljast millum:

| Talva 4. Vinnubólkar | | | |
|---|---|---|---|
| **Framleiðsluvinnur** | **Handil- og tænastur** | **Almenn fyrisiting og tænastur** | **Felagsskapir, mentan o.a. og ótilskilað** |
| Landbúnaður | Handil og umvæling | Almenn fyrisiting og tænastur | Felagsskapir, mentan o.a. |
| Fiskiskapur | Gistihús og matstovuvirki | | Ótilskilað v.m. |
| Ali- og kryvjivirki | Sjóflutningur | | |
| Ráevnisvinna | Flutningur annars | | |
| Fiskavøruídnaður | Postur og fjarskifti | | |
| Skipasmiðjur, smiðjur | Fígging og trygging | | |
| Annar ídnaður | Vinnuligar tænastur | | |
| Bygging | Húshaldstænastur | | |
| Orku- og vatnveiting | | | |

Viðm. Av tí at so fá eru í bólkunum Felagsskapir og mentan o.a. og bólkinum Ótilskilað, eru hesir bólkar lagdir saman.

Umframt hesar bólkar, so eru tey, sum eru lesandi ella í læru, bólkaði fyri seg. Afturat hesum bólkum, so eru tað nøkur, sum ikki hava víst á nakran vinnubólk.




**Mynd 6. Arbeiði býtt í vinnubólkar**

Sum víst í myndini omanfyri, so arbeiða tey flestu (45 prosent) av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, í dag innan tað almenna – og um tey, sum eru lesandi ella í læru og tey verða roknaði frá, so eru tað um 54 prosent, sum arbeiða innan tað almenna. Næst eftir tað almenna arbeiða flest fólk – 25 prosent – innan handils- og tænastuvinnurnar, meðan 9 prosent arbeiða innan framleiðsluvinnurnar.

16 prosent av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni árini 1976-2006, eru lesandi ella í læru. Tað eru serliga tey, sum hava tikið prógv í árunum 2000-2006, sum eru lesandi ella í læru.

## 4.1. Arbeiði og kynsbýtið

Tá hugt verður eftir, hvar ávíkavist kvinnur og menn, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, arbeiða, so er tað rættiliga stórur munur.




**Mynd 7. Arbeiði býtt í vinnubólkar og kyn**

### Fleiri av kvinnum arbeiða hjá tí almenna

Tað eru lutfalsliga fleiri av kvinnunum enn av monnunum, sum arbeiða innan almenna fyrisiting og tænastur – 59 prosent av kvinnunum og 29 prosent av monnunum. Orsøkin er, at hesin bólkurin eisini fevnir um arbeiði innan heilsu- og almannaøkið og barnaansing. Og tá

hugt verður at, hvar innan tað almenna kvinnur og menn arbeiða, so eru tað tilsamans 66 prosent av kvinnunum, sum arbeiða innan heilsu- og almannaøkið og barnaansingarøkið, meðan bert 17 prosent av monnunum arbeiða innan hesi øki. Sí eisini talvuna niðanfyri.

**Talva 5. Arbeiða innan tað almenna – býtt í bólkar og kyn**

| | Kvinnur | Menn | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Heilsuøkið | 31% | 9% | 26% |
| Undirvísing | 19% | 43% | 24% |
| Almenn umsiting | 15% | 33% | 19% |
| Almannaøkið | 22% | 3% | 17% |
| Barnaansingarøkið | 13% | 5% | 11% |
| Annað | 1% | 7% | 2% |
| Tilsamans | 100% | 100% | 100% |
| N= | 281 | 86 | 367 |

Teir flestu av monnunum, sum arbeiða hjá tí almenna, arbeiða innan undirvísing og almenna umsiting (76 prosent), meðan 34 prosent av kvinnunum arbeiða innan hesi øki.

## Handil- og tænastur

Tá hugt verður at kynsbýtinum innan vinnubólkin handil- og tænastur, so eru tað lutfalsliga fleiri av monnunum, sum arbeiða innan hesar vinnur, enn tað er av kvinnunum. Ein orsøk er, at hesin bólkur eisini fevnir um sjóflutning, har nógvir menn arbeiða. Somuleiðis eru tað lutfalsliga fleiri av monnunum, sum arbeiða innan fígging og trygging og innan vinnuligar tænastur.

## Fáar kvinnur arbeiða í framleiðsluvinnunum

9 prosent av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, arbeiða í dag innan framleiðsluvinnurnar. Tá hugt verður eftir kynsbýtinum, so eru tað væl fleiri av monnunum enn av kvinnunum, sum virka innan framleiðsluvinnurnar – 20 prosent av monnunum arbeiða innan framleiðsluvinnurnar, meðan tað bert eru 2 prosent av kvinnunum. Orsøkin til munin er, at lutfalsliga fleiri av monnunum arbeiða innan fiskiskap, fiskavøruídnað og bygging. Tær fáu kvinnurnar, sum virka innan framleiðsluvinnurnar, arbeiða serliga innan fiskavøruídnaðin.

## 4.2. Leiðararstørv

10 prosent av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, arbeiða í dag sum leiðarar ella millumleiðarar.

**Talva 6. Leiðarastørv – býtt í kyn**

| | Kvinnur | Menn | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Leiðari | 3% | 12% | 7% |
| Millumleiðari | 2% | 6% | 3% |
| Annað | 81% | 69% | 76% |
| Lesandi / í læru | 14% | 13% | 14% |
| **Tilsamans** | **100%** | **100%** | **100%** |
| *N=* | *504* | *297* | *801* |

Lutfalsliga eru tað fleiri av monnunum enn kvinnunum, sum arbeiða sum leiðarar og millumleiðarar. 10 prosent av monnunum arbeiða sum leiðarar, meðan 6 prosent arbeiða sum millumleiðarar. Hjá kvinnunum eru tað 3 prosent, sum arbeiða sum leiðarar og 2 prosent sum millumleiðarar.

## 5. Samandráttur

Í tíðarskeiðinum frá oktober 2008 til mars 2009 varð spurnablaðskanning gjørd millum tey, sum hava tikið prógv á miðnámsskúlanum í Suðuroy í árunum 1976-2006. Kanningin er gjørd út frá próvlistunum hjá miðnámsskúlanum í Suðuroy. Tilsamans 850 av teimum 861, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni í nevnda tíðarskeiði luttóku í kanningini.

Eftir miðnámsútbúgvingina hevur ein heilt stórur partur – 84 prosent - nomið sær ella eru farin undir at nema sær eina førleikagevandi útbúgving. Av hesum hava 82 prosent nomið sær eina langa- (16 prosent) ella miðallanga (66 prosent) útbúgving. Meðan 18 prosent hava nomið eina stutta útbúgving.

Tað eru lutfalsliga fleiri menn enn kvinnur, sum hava nomið sær eina langa útbúgving – 18 prosent av monnunum í mun til 7 prosent av kvinnunum. Hinvegin hava lutfalsliga fleiri kvinnur enn menn nomið sær miðallanga útbúgving, tó at munurin er lítil. Tað eru eisini lutfalsliga fleiri kvinnur, sum hava nomið sær stutta útbúgving. Tað eru at kalla eins nógv, sum eru undir útbúgving ella ikki hava nomið sær útbúgving.

Kanningin vísir, at 2/3 av teimum, sum í løtuni eru undir útbúgving, eru stødd uttanlands í útbúgvingarørindum. Tey allarflestu eru í Danmark, meðan nøkur fá eru í øðrum londum.

Kanningin vísir eisini, at ein munandi partur av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, eru flutt av oynni og ikki vend aftur. Bert 41 prosent av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, búgva í dag í Suðuroynni. 30 prosent búgva uttanlands, meðan 29 prosent búgva aðrastaðni í landinum. Tað eru serliga tey við hægri útbúgving, sum búgva aðrastaðni enn í Suðuroynni.

Í tølum eru tað væl fleiri kvinnur enn menn, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni. Í tølum eru tað eisini væl fleiri kvinnur enn menn, sum hava valt at búseta seg aðrastaðni enn í Suðuroynni. Hetta er eisini ein av høvuðsorsøkunum til skeiva kynsbýtið í Suðuroynni – tað eru fleiri menn enn kvinnur í Suðuroynni.

Út við helvtin – 45 prosent – av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, arbeiða í dag innan tað almenna. Næst eftir tað almenna arbeiða flest fólk – 25 prosent – innan handils- og tænastuvinnurnar, meðan 9 prosent arbeiða innan framleiðsluvinnurnar.

Tað eru lutfalsliga fleiri av kvinnunum enn av monnunum, sum arbeiða innan almenna fyrisiting og tænastur – 59 prosent av kvinnunum og 29 prosent av monnunum. Kvinnurnar arbeiða serliga innan heilsu- og almannaøkið og barnaansingarøkið. Meðan teir flestu av monnunum, sum arbeiða hjá tí almenna, arbeiða innan undirvísing og almenna umsiting.

9 prosent av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, arbeiða í dag innan framleiðsluvinnurnar, og eru tað væl fleiri av monnunum enn av kvinnunum, sum virka innan framleiðsluvinnurnar. 20 prosent av monnunum arbeiða innan framleiðsluvinnurnar, meðan tað bert eru 2 prosent av kvinnunum.

At enda vísir kanningin eisini, at 10 prosent av teimum, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni, arbeiða í dag sum leiðarar ella millumleiðarar.

GRANSKINGARDEPILIN FYRI SAMFELAGSMENNING